Kunningarstovan flytir

Kunningarstovan í Vágum flytir í næstu viku í nýggj høli í Miðvági. Í hesum sambandi verður skipað fyri ymsum tiltøkum alla vikuna

KUNNING
Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Miðvági: Kunningarstovan í Vágum flytir á mikkjalsmessu úr kommunuskrivstovuni í Miðvági í høli hjá Godtfred Joensen, har Føroya Sparikassi hevur hildið til, meðan sparikassabygningurin hevur verið umbygdur í summar.

Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum, sigur, at talan verður um nógv størri og arbeiðsligar høli enn tey, Kunningarstovan í dag hevur. Hann vónar, at tað so eisini fer at síggjast aftur í arbeiðinum hjá Kunningarstovuni.

Ymisk tiltøk verða alla vikuna í samband við, at Kunningarstovan flytir, greiðir Terji Nielsen frá. Talan verður um bæði handilslig og mentanarlig tiltøk, sigur hann.

Eitt nú fara handlarnir í oynni at hava opið út á kvøldið. Skift verður millum bygdirnar, sigur kunningarleiðarin.

Onkur kvøldseta verður, og onkrum hugnakvøldi við dansi verður eisini skipað fyri. Konsertir standa eisini á skránni hjá Kunningarstovuni í Vágum fyri næstu viku.

Í samband við, at Kunningarsotvna flytir, verður eisini nýtt búmekri avdúkað. Hetta verður gjørt á samkomu í nýggju hølunum seinnapartin mánadagin, upplýsir Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum.

Kunningarstova í Vágum heldur umfram í Miðvági eisini til á flogvøllinum. Kunningarstovan rekur Kunningardiskin á flogvøllinum. Tað er Felagið Vágar, sum rekur Kunningarstovuna. Felagið Vágar er samtak av vinnufeløgum í oynni.

Kunningarleiðarin í Vágum, Terji Nielsen, fær í næstu viku munandi betri hølisviðurskifti til tey trý fólkini, sum eru knýtt at Kunningarstovuni
Mynd: Edvard Joensen

Kunningarhornið á flogvøllinum gevur fólki møguleika at avgreiða síni bankaørindi uttan fyri vnaligu upplatingartíðir bankans
Mynd: Edvard Joensen

Nýggj bankatænasta á flogvøllinum

Føroya Banki hevur sett eina nýggja teldu upp í bíðihøllini á flogvøllinum. Kunningarhornið gevur kundum bankans atgongd til allar internettænastur bankans

BANKATÆNASTA
Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Flogvøllurin: Nú ber til at avgreiða síni bankaørindi á flogvøllinum uttan fyri vanligu upplatingartíðirnar hjá Føroya Banka.

Við síðuna av gomlu sjálvtøkuni hevur bankin sett upp eina teldu, tað sonevnda Kunningahornið, har fólk við loyniorði til ymsum tænasturnar hjá bankanum, kunnu fara at avgreiða síni bankaørindi.

Av menningardeildini hjá Føroya Banka í Havn verður sagt, at her fæst atgongd til Netbankan, saldo og kontoavrit umframt aðrar tænastur, sum vanliga fæast yvir inernetið. Beinleiðis atgongd er til internetið um hesa telduna á flogvøllinum.

Á fremmandum málið verður hetta nevnt ein Infostandari. Ein, sum letur fólki upplýsingar um tær tænastur, sum bankin gevur.

Kunningarhornið á flogvøllinum er opið samstundis, sum peningasjálvtøkurnar kring landið eru virknar. Frá klokkan seks á morgni til midnátt.

Onkur onnur slík kunningartelda er sett upp, siga tey á Menningardeildini hjá Føroya Banka. Eitt nú stendur ein í gongini í deild bankans í Niels Finsensgøtu í Havn.

FSV Stuðlar royna seg

Nýggja stuðulsfelagið hjá FS Vágum roynir at skava saman nakrar krónur, har tær kunnu finnast. Stóra tiltakið á Giljanesi leygarkvøldið var liður í arbeiðinum at fáa pening til rakstur av felagnum

FÓTBÓLTSSTUÐLAR
Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Vágar: Teir royna sum frægast at gera vart við seg, FSV stuðlarnir. Hava stovnað felag, sum skal vera við til at reka fótbóltsfelagið fíggjarliga.

Hættirnir eru teir vanligu, brúktir verða í slíkum førum. At skipa fyri ymsum almennum tiltøkum og at selja lutir, sum hoyra fótbóltinum til.

Stóra Beatlestiltakið, sum FS Vágar Stuðlar skipaðu fyri í ítróttarhøllini á Giljanesi leygarkvøldið, eydnaðist væl teksnist. Men tá gjørt varð upp, vóru fyrireikararnir ikki so væl ngdir við undirtøkuna, skilst á teimum. Teir høvdu fegnir vilja havt tað dupulta av fólki at komið í dans hetta kvøldið, siga teir. Sagt verður, at umleið 500 atgongumerki vórðu seld til tiktakið leygarkvøldið, og tað er alt ov lítið, halda teir.

Men gav tað ikki tað, ætlað varð, er so aftur fyri neyðugt at royna annað. Og so liggur tað traditionella nær at hugsa. At seja turriklæði, troyggjur og húgvur.

Miðskeiðis í bygdini í Miðvági, við síðuna av Missiónshúsinum, er ein sýnisgluggi, har FSV stuðlar hava lagt út ymiskt, sum felagnum hoyrir til, og sum kann keypast ymsastaðni í oynni.

Sum onnur stuðulsfeløg hava eisini FSV Stuðlar ymiskt, sum hoyrir felagnum til, at selja
Mynd: Edvard Joensen

Seafish kunnar seg um føroyska fiskivinnu

Enski stovnurin, Seafish, er í Føroyum í hesum døgum og kunnar seg um føroysk fiskivinnuviðurskifti. Stovnurin er ein granskingarstovnur, ið millum annað viðger spurningin, hví so onglendingar keypa so nógvan føroyskan fisk

SEAFISH Í FØROYUM
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Hazel Curtis fyri Seafish og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, høvdu nógv at tosa um á Nóatúni týsdagin
Mynd: Jens Kristian Vang

Eitt umboð fyri enska stovnin, Seafish, er í hesum døgum og kunnar seg um føroysk fiskivinnuviðurskifti. Umboðið fyri Seafish, Hazel Curtis, sigur, at stovnurin er fíggjaður av bæði fiskivinnuni í Onglandi og tí almenna. Hann leggur seg eftir at kanna ymisk viðurskifti, so áhugamálini hjá ensku fiskivinnuni verða røkt á haldgóðan hátt.

Arbeiðið hjá stovninum fevnir um gransking, menning av fiskivinnuni, kundarøkt, og hvussu effektiviteturin og støðið í ensku fiskivinnuni kann hækka. Fyri at røkka hesum málum, nýtir stovnurin stóra orku til at kunna seg um fiskivinnu viðurskiftum í øðrum londum enn Onglandi og Skotlandi.

Tað verður hildið gjølla eyga við, hvussu onglendingar kunnu læra av øðrum, og ikki gera somu mistøk, sum onkur lond hava brent seg av. Ferðin til Føroya er liður í eini kunning og er gjørd í samstarvi við føroysku sendistovuna í London.

Hazel Curtis arbeiðir í løtuni við eini granskingarverkætlan, sum viðger evni, ið hava stóran áhuga í føroysku fiskivinnuni. Fyri at kunna føroysku fiskivinnuna um granskingarverkætlanina hevur føroyska sendistovan í London fingið Hazel Curtis til Føroya.

Nógv fólk á Nóatúni

Hazel Curtis kom til landið mánadagin, og hon hevur vitjað fleiri føroyskar stovnar, ið á ymiskan hátt hava tilknýti til føroyska fiskivinnu. Seinnapartin týsdagin greiddi hon frá síni granskingarætlan á Nóatúni, og nógv fólk vóru savnað.

Politiska myndugleikin og umboð fyri bæði fiskivinnuna á landi og á sjógvi vóru møtt fjølment. Hazel Curtis greiddi frá sínum úrslitum, og serliga vakti tað ans, at hon kundi prógva vísindaligt, at bæði prísurin og góðskan á fiski er væl betur, um fiskurin verður hagreiddur umborð á skipi, enn á virkjunum á landi.

Sum skilst hava føroyingar áður verið treiskir við góðtaka hetta sjónarmið, og tí tók kjak seg upp um júst henda spurningin.

Nógvir spurningar svaraðir

Granskingarverkætlanin hjá Hazel Curtis er ikki liðug enn, og ferðin til Føroya er gjørd fyri at fáa nakrar spurningar svaraðar, ið hon ætlar at arbeiða við í framtíðini. Serliga er Hazel áhugað í, hvør orsøkin er, at onglendingar keypa so nógvan fisk frá føroyingum. Hon spyr, hví júst føroyskur fiskur er so áhugaverdur, og hvat enski fiskiídnaður brúkar føroyska fiskin til.

– Eg eri her fyri at savna vitan, og finna orsøkirnar til, at so nógvur føroyskur fiskur verður seldur í Onglandi. Hvat brúka vit føroyska fiskin til, er tað til fiskafingrar ella pommes frites, spyr Hazel Curtis

Hon sigur, at hon hevur fingið nógv burturúr higartil. Hon hevur lært eina rógvu, og serliga hevur túrurin spart henni nógva tíð, tí heldur enn at lesa turr hagtøl, hava føroyingar greitt henni frá føroysku viðurskiftunum. Hon ivast ikki í, at stórur partur av vitanini, hon hevur fingið á ferðini, kemur væl við, nú hon skal arbeiða víðari við verkætlanini í næstum.

Rói Egholm, ein av stjórunum á fiskasøluni Farex:

Neyðugt við granskingarstovni innan fiskivinnuna

Bæði Rói Egholm og John Rajani halda, at stórur tørvur er fyri einum granskingarstovni, ið granskar føroysku fiskivinnuna. Fiskivinnan í Onglandi er rættiliga lítil partur av samlaðu ensku vinnuni, men kortini eru 120 mio. krónur settar av til gransking. Fiskivinnan í Føroyum svarar til góð 95% av samlaðu vinnuni, men kortini er ikki ein króna sett av til gransking, og tað er undrunarvert, heldur Rói Egholm

GRANSKINGARSTOVNUR Í FØROYUM
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Rói Egholm, ein av stjórunum á Farex, var eitt av umboðunum fyri fiskivinnuna á landi, sum var á fyrilestrinum hjá Hazel Curtis týsdagin. Hann helt fyrilesturin vera rættiliga áhugaverdan, og serliga beit hann merki við, hvussu týdningarmikið tað í veruleikanum er at hava ein granskingarstovn sum Seafish í føroysku fiskivinnuni.

– Hon legði heilt smáar partar av granskingarætlanini hjá sær fram, men tað mest áhugaverda er, hvussu stovnurin Seafish arbeiðir, sigur Rói Egholm.

Hann greiðir frá, at granskingarstovnurin er partvís fíggjaður av ensku vinnuni og tí almenna. Hann kostar góð 11 mio. pund um árið, og vinnan fíggjar góðar átta milliónir pund.

– Fyri at seta enska stovnin í rætt perspektiv, so svarar fiskivinnan til gott 1% av samlaðu ensku vinnuni, men kortini lata teir yvir 120 milliónur krónur til gransking á økinum, meðan fiskivinnan í Føroyum svarar til 95 % av samlaðu vinnuni, og har verður ikki gevið ein króna til gransking, og tað er undrunarvert, sigur Rói Egholm.

Hann heldur, at stórur tørvur er á analytiskum tilfari um føroysku fiskivinnuna. Rói vísir á, at Hermann Oskarsson fyri Hagstovuna hevur sagt, at føroyingum vanta hagtøl og Rói kann ikki annað, enn taka undir við Hermann, tí hagtøl eru avgerandi um gransking innan fiskivinnuna skal fáast upp á føtur í Føroyum.

- Hazel Curtis arbeiðir millum annað við spurninginum, hvar onglendingar keypa sín fisk og hví, og bara tann spurningurin er rættiliga stórur og áhugaverdur at granska í, og ikki minst í Føroyum, heldur Rói Egholm

John Rajani samdur

Rói Egholm er ikki einsamallur um at halda, at tørvur er fyri einum granskingarstovni innan fiskivinnu í Føroyum. John Rajani, ið er við Hazel Curtis í Føroyum, skilir heldur ráðfestingina í føroyskari fiskivinnu.

– Vit mangla avgjørt ein stovn sum Seafish í Føroyum, ið kann verða við til orða ein fiskivinnupolitikk í Føroyum fyri tey næstu 5-10 árini. Sea Fish arbeiðir við, hvat brúkarin ynskir, hvørjar vørur eru tær bestu og hvussu vinnan skal klára seg í altjóða kapping, og hesir spurningar eru neyðugur at viðgera á granskingarstigi, sigur John Rajani.

John Rajani vísir á, at í Føroyum hava vit tann óvana at hyggja ov nógv aftureftir. Hann heldur, at vit vita fullvæl, hvussu fiskuri skal fáast til høldar, men tá, ið fiskurin er komin á land eru vit ikki nóg dugnaligir.

– Høvdu vit havt ein granskingarstovn, so høvdu møguliga fingið eitt meira ítøkiligt svar uppá, hví heili 50.000 tons fóru óvirkað av landinum í fjør, spyr John Rajani at enda.

Tað eru árliga settar góðar 120 milliónir krónur til gransking í fiskivinnuni í Onglandi. Í Onglandi svarar fiskivinnan til gott 1% av samlaðu ensku vinnuni, meðan fiskivinnan í Føroyum svarar til um 95 % av samlaðu vinnuni, men kortini er ikki ein króna sett av til gransking, og tað er undrunarvert, heldur Rói Egholm
Mynd: Jens Kristian Vang